**Úr grannalondum**

*Lagt til rættis: Árni Joensen*

## Helvtin av senditilfarinum var íslendskt



Helmingurin av sendingunum, sum vóru í íslendska ríkissjónvarpinum í fjør, var íslendskt senditilfar. Tað kom fram í sambandi við ein fyrispurning í Altinginum nú um dagarnar.

Í svarinum frá mentamálaráðharanum stóð, at 50,7 prosent av tilfarinum, sum sjónvarpið sendi í fjør, var íslendskt, 26,1 prosent var av amerikonskum uppruna, og 7,5 prosent var norðurlendskt tilfar. Orsakað av kappingarviðurskiftum vildi ráðharrin ikki upplýsa, hvat sjónvarpið rindaði fyri tað amerikanska og tað norðurlendska tilfarið.

## Ætlaði at drepa 17 fólk

Rætturin í svenska býnum Linköping kom fyrradagin til ta niðurstøðu, at ein 26 ára gamal maður í býnum skal hava dóm fyri at hava havt ætlanir um at myrða 17 fólk.

Aftonbladet skrivar, at undir húsarannsókn heima hjá manninum fann løgreglan ein lista við nøvnunum á 17 persónum, sum arbeiða hjá ymsum myndugleikum, og sum høvdu tikið avgerðir, sum ikki gingu tí 26 ára gamla á møti.

Rætturin hevur ikki ásett revsingina enn, tí sálarfrøðingar skulu fyrst kanna sinnisstøðuna hjá manninum, skrivar Aftonbladet.

## Olja frá Goðafossi hóttir sjófugl

Olja, sum lak úr íslendska farmaskipinum Goðafossi, tá tað fór á land við Oslofjørðin í februar, kann hótta sjófuglin, sum heldur til í tí friðaða økinum Grønningen. Halvard Olsen, sum arbeiðir hjá Lillesund kommunu, sigur við Aftenposten, at myndugleikarnir royna at avmarka skaðan.

Grønningen er einar 30 fjórðingar frá staðnum, har Goðafoss fór á land tann 17. februar. Nakrar dagar seinni varð skipið togað avaftur og haðani til Odense til umvælingar.

# Miðvís stovnsrøkt gevur úrslit

**Tað kemur ikki óvart á íslendsku fiskifrøðingarnar, at skip og bátar fáa meiri av stórum toski nú enn fyri nøkrum árum síðani**



– Tað, sum vit nú síggja, er úrslitið av reglunum um, hvussu nógvan tosk vit kunnu fiska, og hvussu nógv vit kunnu taka burtur úr stovninum, sigur Björn Ævarr Steinarsson, sum er fiskifrøðingur á havrannsóknarstovuni í Reykjavík, við Morgunblaðið.

Hann sigur, at málið við at avmarka fiskiskapin eftir toski er at fáa mest møguligt burtur úr stovninum yvir eitt longri áramál. Herumframt hevur tann politiski myndugleikin sett eitt minstamark fyri, hvussu stórur gýtingarstovnurin skal verða í 2015.

Íslendsku fiskifrøðingarnir søgdu í fjør, at toskastovnurin fór at verða størri í ár, og tað fer væntandi at síggjast aftur í kvotuásetingini fyri næsta fiskiár.

– Okkara royndir vísa, at tað er vorðið munandi meiri av stórum toski tey seinastu árini, og tað, sum vit nú hoyra frá góðum fiskiskapi, samsvarar eisini við tað, sigur Björn Ævarr Steinarsson.

Havrannsóknarstovan hevur júst gjørt tær árligu vármátingarnar av toskastovninum, og úrslitið kemur tíðliga í næsta mánað.

# Danska vinnulívið ger íløgur uttan fyri Danmark



*Fyritøkan Danfoss hevur gjørt nógvar íløgur uttanlands. Hendan deildin er í Týsklandi (Mynd: Danfoss)*

**Næstan helmingurin av teimum stóru donsku fyritøkunum, sum ætla sær at gera íløgur í framleiðslutól, fara at gera íløgurnar uttan fyri Danmark**

Umleið 20 prosent av teimum fyritøkunum, sum ætla sær av landinum at gera íløgur, siga, at tær gera tað, tí har fáa tær betri atgongd til arbeiðsmegi við tí neyðuga førleikanum.

Tað er vísir ein spurnarkanning, sum Dansk Industri hevur skipað fyri, og sum 368 fyritøkur hava verið við í. Kent Damsgaard hjá ídnaðarfelagnum sigur við Jyllands-Postin, at hendan gongdin er vorðin ein trupulleiki fyri tað danska samfelagið.

– Hetta fer at hava við sær, at teir donsku løntakararnir, sum eru dýrir, standa við ótíðarhóskandi framleiðslutólum, sum geva minni og minni, sigur hann.

Jan Rose Skaksen, sum er professari á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, stúrir eisini fyri gongdini.

– Verður endin tann, at dýr donsk arbeiðsmegi stendur við gomlum maskinum, fer tað at gera trupulleikarnar við vørumenning enn størri, sigur hann við Jyllands-Postin.